## Fisker av vøllinum



Knud Erik Fisker, sum í fleiri ár var topp-dómari í donskum fótbólti, endaði ofta í yvirskriftunum sum ein paragraff-ryttari í svørtum klæðum. Tí vóru lokalu miðlarnir eisini skjótir frammi við penninum, tá Fisker sjálvur fekk reytt kort um vikuskiftið. Hetta hendi í seriu 3 dysti fyri Holbæk. Har helt Fisker seg eiga brotsspark, men tá dómarin ikki dømdi, kom eitt »tápulingur« av varrunum hjá Fisker. Og tað kostaði gult kort og harvið 10 minuttir á beinkinum, skrivar nordvestnyt.dk.

## Newcastle til sølu

Trýstið á Mike Ashley, sum eigur Newcastle United, hevur verið stórt, og tað gjørdist ikki minni, tá teir svørt/hvítu um vikuskiftið taptu 2-1 móti Hull á heimavølli. Ashley hevur átt felagið síðani 2007, men nú vil hann selja. – Mær hevur altíð dámt at tikið børnini hjá mær við til dyst, men tað kann eg illa í løtuni, tí eisini tey merkja ágangin móti mær. Og tí vil eg ikki longur stuðla felagnum fíggjarliga, sigur Ashley í tíðindaskrivi. Mike Ashley keypti Newcastle United fyri 1,25 milliard fyri 15 mánaðum síðani.

Neistin-Lovcen 33-32 (14-19):

# Europiskt bragd av Neistanum

**Hóast samlaði sigurin ongan tíð var í nánd, so var tað eitt bragd av Neistanum, tá teir seinasta korterið vunnu seks mála leiðsluna hjá Lovcen aftur**



*Blagoje Buha prógvaði, at hann hevur neyvleikan og royndirnar, sum skulu til í altjóða dystum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**HONDBÓLTUR**

*Jákup Mørk*

*jakup@sosialurin.fo*

Við 14 málum í skjáttuni kundi Lovcen úr Montenegro taka tað hampuliga rólig, tá teir løgdu Føroyaferð sína til rættis.

Sigurin merkti eisini, atLovcen var greiður favorittur, og fyrstu longu løtuna livdi liðið av Montenegro eisini upp til hetta heitið.

Tí hóast Neistin fylgdi væl við, so vóru tað leingi gestirnir, sum høvdu munin. Spakuliga drógu teir frá teimum bláu, og tá farið varð undir seinna hálvleik, skrædnaði veruliga. Soleiðis var munurin komin upp í seks mál, tá Neistin brádliga fekk nakrar yvirtalsstøður. Hesum dugdi teir bláu at gera sær dælt av, og tá talan so eisini var um triðju útvísingina hj´abæði Pejovic og Popovic hjá Lovcen, viknaði annars kontanta verjuspælið hjá gestunum heilt nógv.

Og Neistin koyrdi veruliga á. Seinasta korterið ótu teir burtur av leiðsluni hjá gestunum, og bara tveir minuttir undan leikloki stóð á jøvnum. Og tá Neistin so eisini fekk seinasta málið í dystinum mundu teir 500 áskoðararnir lyft takið av høllini. Hetta hendi bara 25 sekund fyri leiklok, og vildi væl til, so kundi Neistin eisini økt upp í tvey mál, tá teir fiskaðu bóltin úr seinasta Lovcen-álopinum. Men tá vóru seinastu sekundini runnin.

**FAKTA um dystin**

**Neistin-Lovcen 33-32 (14-19)**
Lovcen víðari við samanlagt 67-54
**Málskjúttar**
**Neistin:** Blagoje Buha 7, Bogi Berg 5, Finnur Hansson 5, Ingi Olsen 5, Jugoslav Djumic 3, Tróndur Kragesteen 3, Áki Mørk 3, Mohr 2
**Lovcen:** Markovic 6, Mustafic 5, Pejovic 5, Biljak 4, Petricevic 3, Popovic 3, Sevaljevic 3, Anicic 1, Lisicic 1, Popovic 1
**Útvísingar:** Neistin 3, Lovcen 8

# Sum at vinna gull

**Karl Oddmar Rasmussen er ein av royndu kreftunum í Neistanum, men hóast hann hevur verið vi til at vinna tvey FM-gull, so hevði hann ongan tíð áður roynt at spælt Europa Cup hondbólt fyrr enn fyri góðari viku síðani**



*- Handan løtan á vøllinum beint eftir dystin var fantastisk, sigur Karl Oddmar Rasmussen*

*Mynd: Álvur*

**HONDBÓLTUR**

*Jákup Mørk*

jakup@sosialurin.fo- Hetta var ein fantastisk uppliving. Tá vit fóru til útidystin hildu vit, at vit høvdu møguleikan, men vit máttu ásanna, at teir vóru eitt petti hvassari enn vit. Vit vóru ikki so nógv verri enn teir, men tað vísti seg, at teir revsaðu okkum, hvørja ferð vit slakaðu tað allar-allar minsta. Seinastu vikuna hava vit vant nógv undir trýsti, og tað tóktist eisini geva úrslit leygardagin.

Og hvussu var kenslan, tá tit so vunnu.

- Handan løtan á vøllinum beint eftir dystin var fantastisk. Nú havi eg vunnið FM-gull tvær ferðir, men hetta var akkurát líka gott. Seinasta korterið var alt liðið uppi at koyra. Vit kendu á okkum, at sigurin kundi røkkast, og tá alt liðið og allur bonkurin kemur soleiðis upp, er tað fantastiskt at spæla, sigur Karl Odmar.

Men hóast løtan var stór, so tykist Karl Oddmar vera eins skjótur aftur á jørðina, tá vit spyrja hann, um hetta styrkir trúnna um enn eitt FM-heiti.

- Kappingin er lang og hørð, og fyrst og fremst fara vit eftir næsta dystinum. Sjálvandi er málið, at vit skulu vera millum liðini, sum berjast fyri pláss í finaluni til várs, men tað eru altso nógvir dystir, sum skulu spælast, áðrenn tann spurningurin er greiddur, sigur Karl Oddmar Rasmussen.

